Til
Løgmann, landsstýrisfólk og løgtingslimir

Skopun, 3. jun. 2011

Løgtingsmaðurin Gerhard Lognberg hevur í morgun boðað borgarstjórum í Sandoy og Skúvoy til fundar á kommunuskrivstovuni í Skopun kl. 13. 00.

Støðan hjá okkum í Hesti, Sandoy og Skúvoy er ótolandi. Tað hoyrir næstan til dagligdagin, at Teistin hevur brek.

Hetta hóttir ta sindrið av vinnu, sum er í økinum. Flakavirkið fær í stóran mun rávøruna við Teistanum, og liðugvøra fer aftur við skipinum.

Í morgun stóð eitt stórt ferðalið eftir á Gomlurætt. Tað slapp ikki til vegin fram. Ferðaliðið skuldi til Skúvoyar og til Skálavíkar. Tey, sum fáast við ferðavinnu missa inntøku nærum hvønn dag.

Fólk, sum ferðast ímillum til arbeiðis, verða forðaði í allar mátar, til tey bara noyðast at flyta til miðstaðarøkið, sum nógv longu hava gjørt.

So er tað trygdin hjá okkum, sum nýta farleiðina. Vit kunnu bara gera okkum tankar um, hvussu stórar ólukkur kunnu henda, um illa vil til.

Her má tann politiski myndugleikin traðka til og tryggja avloysaraskip. Hetta má gerast beinanvegin.

Síðan má arbeiðið við Sandoyartunlinum byrja. Fyrst við at lýsa partafelagið. Tað peningur er tøkur at gera tað fyri. Hetta er nakað, sum landsstýrismaðurin í innlendismálum kann seta í verk beinanvegin.

Av tí at ferðasamband okkara seinastu tíðina hevur víst seg at verið sera svikaligt, og Teistin er okkara landsvegur inn á meginøkið, kenna vit okkum noydd at seta hesi krøv:

1. At avloysaraskip altíð er tøkt.
2. At Teistin ikki kemur aftur í sigling, fyrr enn brekini eru rættað.
3. At allir 3 motorarnir á Teistanum altíð eru tøkir, soleiðis at Teistin ongantíð siglir við niðursettari ferð.
4. At trygdin er í lagi, soleiðis at fólk óttaleys kunnu ferðast.

At so landið krevur pening frá okkum fyri sms-ini, ið teir senda við avlýsingum, hoyrir ongastaðni heima. Ein slík tænasta eigur sjálvandi at vera ókeypis.

Gerhard Lognberg
løgtingsmaður

Brandur Sandoy
borgarstj.

Arnbjørn Bjarnarson
varaborgarstj.

Sjúrður Nolsøe
varaborgarstj.

Kathrina Joensen
varaborgarstj.

Harry Jensen
borgarstj.

- 7 JUNI 2011

LØGTINGIÐ
J.nr.: